## ... um Rók av Fløtum Jespersen

Rókur er ein eminentur "verju-upplirkari". Hann er ein spælari, sum eitthvørt lið hevur brúk fyri, og sum álopsspælarar elska at verða í liði saman við. Hann er ein inteligentur spælari, sum kennir rennimynstrini hjá sínum viðleikarum. Sum systkinabarn eri eg sjálvandi ógegnigur, men eg meini eisini, at hann er eitt gott menniskja.

## ... um Liverpool FC

Eg gleði meg til báðar hálvfinalurnar í Champions League ímóti Chelsea. Annars hevur avrikið hjá Liverpool verið øgiliga misjavnt, men nú eru teir so byrjaðir at vinna á teimum smærri liðunum, og nú skora teir so í hvørjum dysti. Torres og Gerrard eru tveir fantastiskir spælarar, men mín stóra útlendska fyrimynd er also Alexander del Piero.

# ger - og heimaftur



*Andrew av Fløtum skal í ár royna at skjóta HB til gull í Formuladeildini. Farna vikuskiftið gjørdi hann mál nummar 100 fyri HB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

eg hevði, ístaðin fyri at renna við bóltinum, tí eg eri jú ikki av skjótastu monnum.

### Góð ár í Fremad

Andrew sær uppá tey 4 árini í Fremad Amager, sum eina góða tíð.

– Eg fekk nógv burtur úr fótbóltsliga, men eg vil siga, at eg fekk enn meiri burtur úr persónliga. Tað vóru nakrir ótrúliga fittir og festligir viðspælarar eg hevði í Fremad Amager, og tá vil eg serliga nevna Martin Nielsen og Kenny Thorup. Vit spældu altíð heimadystirnar tíðliga sunnumorgun í kirkjutíð. Av tí sama nevndu Fremad-viðhaldsfólkini heimavøllin í Sundby Idrætspark fyri "Kirken". Tá tey sótu á stamvertshúsunum seint leygarkvøldið søgdu tey við hvønn annan, áðrenn teir fóru heim í song: "Vi ses i kirken!".

- Summar heimadystir tá ættin lá ímóti vøllinum kundu vit lukta hasjroykin frá summum av áskoðarunum. Fremad var eitt ógvuliga serstakt arbeiðarafelag við einari serstakari áskoðaramentan.

Andrew er spentur uppá FC Amager ætlanina hjá Toda Jónssyni, og vónar hann, at tað fer at ganga væl hjá samanlagda felagnum.

### Fyrsta dystin í 1996

Andrew fekk sín fyrsta dyst á besta liðnum hjá HB í 1996. Hann minnist, at tað var ímóti KÍ, og at táverandi HB-venjarin, Jóhan Nielsen, bað hann fara inn og njóta teir síðstu minuttirnar av dystinum. Í 1997 fekk hann tey 3 fyrstu málini á besta liðnum, og í 1998 skeyt hann aftur 3 mál í landskappingini, men tá skoraði hann eisini í finaluni í kappingini um løgmanssteypið, tá HB vann 2-0 á KÍ í finaluni. Hetta árið vunnu teir eisini Føroyameistaraheitið.

Andrew var glaður fyri at sleppa at spæla á liðið saman við monnum, sum Jens Erik Rasmussen, Róa Árting, Una Arge, Kaj Leo Johannesen, Allan Mørkerø, Hans Fróða Hansen og Jóhannus Joensen. Andrew var eisini glaður fyri Ion, sum venjara.

– Ion var mín "mentor". Hann hevði stóra ávirkan á meg, hann fekk meg burtur úr "amatør"-hugsunnarháttinum, og fekk meg at gerast mentalt vaksnan uppá tann harða mátan. Eg gjørdi, sum hann gav boð um. Bað hann meg renna fimm rundir eyka, ja, so gjørdi eg tað. Men hann var rættvísur, og hann lønti mær aftur við at vísa mær álit og geva mær spælitíð á besta liðnum.

### Mundu komi víðari

Sama árið mundi HB leikt seg víðari í UEFA-Cup. Andrew legði upp til Súna Fríða Johannesen, sum skoraði bæði málini í 2-0 sigrinum á Svangaskarði ímóti Vaasa úr Finnlandi. Í returdystinum vóru teir aftanfyri 0-3, tá hevði Súni Fríði ein risamøguleika at skora til 1-3, og at senda HB víðari uppá útivallarmál, men ólukkutíð so tók Súni Fríði ikki kjansin tá hann beyðst.

Árið eftir vóru teir aftur í Finnlandi, tá fingu teir 1-1 heima, og taptu 0-5 úti. Andrew var eisini á Kýpros, heima í mjørkanum fingu teir 1-1 ímóti Apoel, men teir blivu væl og virðiliga grilaðir í hitanum niðri í Kýpros, og taptu teir eisini 6-0.

– Eg vil kortini siga, at tað er besti túrur eg havi havt við nøkrum fótbóltsliði. Hann var ótrúliga góður.

Í landskappingini komu so nøkur misjøvn ár, í 1999 hilnaðist einki serligt, í 2000 misti teir á stokkinum, bæði í landskappingini og í steypakappingini. 2001 var eitt vána ár, Andrew var illa skaddur, og HB gjørdist nr. 7, sum er søguliga vánaligt fyri felagið. Í 2002 og 2003 reistist HB kortini aftur, og við Andrew í einum avgerandi leikluti vunnu teir Føroyameistaraheitið. Sama heystið byrjaði hann uppá tíðina í Fremad Amager.

### Við á landsliðunum

Sum ungur spælari spældi Andrew við á U-17 og U-19 landsliðunum. Hann minnast, at Eysturríki vóru gestaluttakarar í norðurlandameistaraskapinum fyri U-17 lið í Vejle. Hetta var í 1996. Eysturríki vann 7-1, men Andrew gleddist stórliga um málið hann skeyt. Í U-19 høpi var eitt tað besta minnið, tá teir leiktu ímóti Fraklandi og Svøríki í Kalmar í Svøríki. Teir taptu heiðurliga 0-2 ímóti Fraklandi, sum hevði ein ávísan Nicolas Anelka á liðnum. Andrew minnist, at Anelka kom við privatflogfari til kappingina, hann spældi við Paris Saint Germain tá. Andrew harmast, sum so mangur annar, at U-21 landsliðið ikki er komið upp at standa fyrr enn nú, tí bindiliðið millum U-19 og A-landsliðið hevur manglað. Fyrstu ferð Andrew var úttikin til A-landsliðshópin var til útidystin í Sveis, tá Føroyar taptu 1-5 á útvølli, hetta var í 2000. Andrew og Christian Høgni Jacobsen debuteraðu báðir á vári í 2001 ímóti Svøríki í stóru innandura høllini í Växsjö í Svøríki, tá eydnaðist at fáa ein 0-0 javnleik. Andrew hevur skotið eitt landsliðsmál ímóti Kasakstan, men hann hevur rakt yvirleggjarin ímóti bæði Hollandi og Skottlandi. Hann metir dystirnar ímóti Fraklandi, Hollandi, Italia og Týsklandi at verða tær størstu upplivingarnar, serliga útidysturin ímóti Týsklandi á Niedersachsen Leikvøllinum í Hannover.

– Tað var fantastiskt at hoyra 1.000 føroyskar áskoðarar syngja tjóðsangin 5 minuttir áðrenn tíð. Aftaná dystin fóru vit yvir at heilsa uppá føroysku áskoðarnar og takka teimum fyri stuðulin. Tá vit ganga tvørtur um vøllin aftur, tá leggja vit til merkir, at allir teir týsku áskoðarnir standa og klappa fyri okkum. Tað var ein óbeskrivilig kensla!

Andrew ásannar, at tað hevur verið langt í millum snapsirnar á landsliðnum nú. Hann er kortini nøgdur við fyrru helvtina í 2007, tá landsliðið sýnti gott spæl ímóti Georgia, Skotlandi og Italia. Men hann harmast um, at nógv fólk eru so neilig, og at tey ynska nærmast, at landsliðið verður avtikið við lóg. Hann metir, at fólk seta órímilig krøv, og at tungar byrðar eru lagdar á landsliðið til komandi undankapping. Men hann vónar, at landsliðið hórar undan. Sjálvur hevur hann skrivað undir ein 4-ára sáttmála við HB, og har ætlar hann røkka sínum málum fyri fyrst.

## Fakta

**Navn:** Andrew av Fløtum
**Føddur:** 13. juni 1979
**Starv:** Fótbóltsspælari og veitingarmaður (Baresso)
**Feløg:** HB og Fremad Amager (fótbóltur) og Neistin (hondbóltur)